Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



BANKASTJÓRIN VIÐ BORÐENDAN

Dimmlætting er nú farin á aðrar hendur. Bankin og tey bæði fyrrverandi reiðaríini, sum gjøgnum íøgufelagið Løkir áttu blaðið, hava nú selt tað til Sp/F Reyðberg, sum Eyðfinnur Reyðberg í Klaksvík eigur einsamallur.

Vit ynskja Eyðfinni Reyðberg bestu eydnu við verkæltanini og heilsa honum vælkomnum í hesa vinnugreinina. Eyðfinnur Reyðberg sigur, at hann ikki ætlar sær at ávirka journalistikkin hjá blaðnum, men at hann heldur ikki bara er ein passivur íleggjari. Hann segði, at hetta er ein gamal dreymur, sum er gingin út: At sleppa at sita við borðendan í síni egnu fyritøku!

At dríva blaðvirksemi í Føroyum er ikki júst tað, sum gevur mestan pening av sær. Dimmalætting er eitt gott dømi um, hvussu illa tað kann ganga hjá einum væl etableraðum virki. Blaðið, sum var Føroya nógv største blað, bæði í upplag, inntøkum og inntjening, varð fullkomiliga tikið av fótum, og endaði tað við húsagangi, har allar ognir hjá felagnum fóru fyri skeyti - ognir, sum felagið hevur arbeitt upp í 130 ár. Seinastu fimm árini hevur tað kostað fyrrverandi partaeigarunum í Dimmalætting yvir 30 milliónir krónur at geva blaðið út. Hesar 30 milliónirnar eru farnar út í bláu luft, og fyrrverandi sparikassastjórin í Klaksvík tekur nú við avbjóðingini. Hann hevur blaðið, brandið, starvsfólkini, lýsararnar, haldararnar og keypararnar - og skal byrja av nýggjum við egnum pengum. Hetta er sanniliga ein avbjóðing.

Tá vit siga, at blaðútgáva ikki júst er eitt gullnám, so eiga vit eisini at siga, at tað sjálvandi ber til at fáa blaðútgávu at bera seg. Avbjóðingin er bara tann, at bløðini hava færri lesarar av prentaða blaðnum, men við interneti og radio ber til at røkka fleiri lesarum og lurtarum. Øll bløð í til dømis Danmark missa lesarar. Upplagstølini eru minkað munandi, men kanningar vísa tó, at bløðini við nýggju og skjótu miðlunum saman við blaðnum tilsamans røkka fleiri fólkum, enn áður.

Í Føroyum hava vit tó ta marghættligu støðu, at tað almenna er í beinleiðis kapping við privatar miðlar. Vit hava eitt alment skattafíggjað Kringvarp, sum er í beinleiðis kapping við privatu miðlarnar um lýsingar. Vit sakna ein mentamálaráðharra, sum hevur rygg til at rætta hendan skeivleika, sum kann tryggja okkum eitt óheft kringvarp, og sum soleiðis kann tryggja eina rættvísa kapping um lýsingarkrónurnar.

Hetta hevði gangað føroyska miðlaheiminum og harvið fólkaræðinum í Føroyum.

» Tað er ein stór avbjóðing at geva Dimmu fyri egna pengar

Teitur í Vild med Dans



Føroyski tónleikari Teitur Lassen var fríggjakvøldið við í donsku sendirøðini Vild Med Dans. Men tað var nú ikki sum ein av dansarunum, at tónleikarin í Havn luttók í sendingini. Hann spældi ein sang hjá sær live. Patrick Wozniacki, sum er beiggi stóru donsku tennisstjørnuna Caroline Wozniacki, brúkti sangin Sleeping With The Lights On til sín dans, og Teitur var í upptøkuhølunum og sang sjálvur sangin saman við orkestrinum, sum spælir undir til dansirnar.

Ger sum Sosialurin, Eyðfinn

- Eyðfinn Reyðberg skal bara gera sum Sosialurin, so gongur tað nokk.

Tað var boðskapurin hjá Øssuri Winthereig, fyrrverandi tíðindaleiðara í sjónvarpinum, tá hann fríggjakvøldið gjørdi viðmerkingar til søluna av Dimmalætting í Degi og Viku.

Øssur Winthereig segði, at man í 130 ár hevur elskað bløð, og at hesin alskur var orsøk til, at bløðini eru komin út. Nú ger man tað, tí man skal tjena pengar, nú tosar man um íløgur og inntøkur, segði Øssur.

Fyrrverandi tíðindaleiðarin í sjónvarpinum roknar við, at Dimmalætting fer at leggja seg meira eftir internetinum, at fyritøkan soleiðis fer at breiða seg frá gamla pappírinum til internetið, til fartelefonina - og ja, kanska eisini til eina útvarpsstøð.

Um Dimmalætting fer at gera meira við internetið og at fáa sær eina útvarpsstøð, so fer blaðið at klára seg í kappingini, heldur Øssur Winthereig

Ja, um Dimmalætting ger tað sama sum Sosialurin við einum blað, einum Miðlahúsi við fundum og tiltøkum, við Portalinum og við útvarpsstøðini Rás2, ja, so er Dimmalætting á vinnarakós, heldur altso Øssur Winthereig.

» Broytt lívsstílin hjá føroyingum

HANS PAULI STRØM
KJAK Á SÍÐU 12



» Eru Føroyar tilaftur-skomnar?

HEINI OLSEN
KJAK Á SÍÐU 29

Nýggi bygningurin hjá Gøtu skúla við Gøtugjógv

Mynd: Jonhard Hammer

Taka nýggjan bygning í brúk

Taka nýggjan bygning í brúk Gøtu skúlu hevur í morgun tikið nýggjan tilbygning í brúk.

Fýra nýggjar skúlastovur eru í bygninginum, sum fer at gera tað meira rúmsátt hjá næmingunum. Nýggi tilbygningurin fer at avlasta verandi skúla nakað, og skúlin fær eisini serstovur til eitt nú tónleik, heimkunnleika og handarbeiði. Leiðslan í Gøtu skúla fegnast um útbyggingina, men ásannar eisini, at kringumstøðurnar kundi verið betri. Men sagt verður, at arbeitt verður við einari umbygging av spæliplássinum og liðugtgerð av einum nýggjum spæliplássi, og at hetta fer at gera trivnaðin í fríkorterunum munandi betri.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

Tórshavn Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

Norðoyggjar Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

Suðuroy tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

Haldarar, *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*